**Kunngerð**
**um**
**uppslag av upplýsingum um rættindi hjá sjófólkum og skipsførarum sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini**

Við heimild í §§ 68 og 71 d í løgtingslóg nr. 4 frá 15. januar 1988 um starvsviðurskifti v.m. hjá sjófólki, sum broytt við § 1 í løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011 og løgtingslóg nr. 133 frá 20. desember 2016, og í samráð við landsstýrismannin í samferðslumálum, verður ásett:

**§ 1.** Henda kunngerð er galdandi fyri sjófólk og skipsførarar sambært § 1, stk. 1 og § 47 í løgtingslógini, ið starvast umborð á einum føroyskt skrásettum skipi, uttan mun til sigliøki og hvat skipini verða nýtt til, tó eru fiskiskip og stuttleikafør undantikin.

**§ 2.** Sum upplýsing um rættindi hjá sjófólkum og skipsførarum sambært løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, skal tann í skjali 1 og 2 viðfesta váttanin verða atkomulig fyri sjófólkini umborð á skipinum.
*Stk. 2.* Váttanin skal vera á arbeiðsmálinum umborð á skipinum ella á enskum. Um skipið er í altjóða sigling, skal váttanin verða á enskum, ella hava viðfest eina enska umseting.

**§ 3.** Brot á hesa kunngerð verður revsað við sekt.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi tann 18. januar 2017.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 6. januar 2017

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Skjal 1**

**Váttan sambært sáttmálanum um starvsviðurskifti hjá sjófólki regla A 4.2.2 um lóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða**

Eitt og hvørt sjófólk, ið er sett at gera arbeiði á einum skipi undir føroyskum flaggi, er á jøvnum føti við persónar, ið eru settir at arbeiða í Føroyum og uttan mun til, um arbeiðið er í samband við raksturin hjá skipinum, fevnt av løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, um talan er um fylgjur av arbeiðsskaðum og vinnutreytaðum sjúkum. Føroya Vanlukkutryggingarráð tekur avgerðir eftir løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða í málum viðvíkjandi arbeiðsskaðum og vinnusjúkum.

Eigarin av hesum skipi hevur skyldu til at tekna trygging í einum tryggingarfelagi fyri allar persónar, sum eru settir í starv at arbeiða umborð á føroyskt skrásettum skipum eftir skiparans ávísing, ið veitir fulna fyri krøv sambært løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, um talan er um fylgjur av arbeiðsskaðum, og til at gjalda inn til Vinnusjúkugrunnin fyri at veita fulna fyri krøv orsakað av vinnutreytaðum sjúkum.

Skiparin á hesum skipi hevur skyldu til at skriva niður upplýsingar í dagbókina um møguligar arbeiðsskaðar ella vinnutreytaðar sjúkur og at boða frá vinnutreytaðum skaðum, soleiðis sum tað er ásett í løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

Tá ein arbeiðsskaði tekur seg upp á einum skipi undir føroyskum flaggi, og arbeiðsgevarin ikki hevur teknað eina trygging, skulu tryggingarfeløgini, ið tekna arbeiðsskaðatrygging í Føroyum, rinda útreiðslurnar sambært § 21, stk. 1 í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

Veitingar sambært lógini eru:

1) Endurgjald fyri mist vinnuføri.
2) Skaðabót fyri varandi mein.
3) Útreiðslur til heilivág, sjúkuviðgerð o.a. sum ikki verður dekkað av føroyskari heilsutrygd.
4) Skiftisveiting til eftirsitandi persónar, ið tann deyði hevur skyldu at forsyrgja.
5) Endurgjald fyri miss av uppihaldara.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Føroya Vanlukkutryggingarráð:

Føroya Vanlukkutryggingarráð
c/o Sorinskrivarin
C. Pløyensgøta 1
100 Tórshavn

E-Mail: fvr@sorinskrivarin.fo
Phone: +298 31 10 03

**Skjal 2**

**Declaration under Maritime Labour Convention's standard A 4.2.2 on Parliamentary Act on Compensation for Industrial Injuries**

Any seafarer, who is engaged to carry out work on board vessels under Faroes flag, whether or not the work is related to the operation of the ship, is on an equal footing with persons engaged to carry out work in the Faroe Islands, covered by the Faroes Parliamentary Act on Compensation for Industrial Injuries (løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða) against the consequences of industrial injuries and occupational diseases. The Faroese National Board of Industrial Injuries (Føroya Vanlukkutryggingarráð) decides if there shall be payed any compensation as provided in the Act.

The owner of this vessel is liable to take out insurance covering all persons engaged to work on board Faroes flagged vessels under the instruction of the master of the ship with an insurance company meeting the requirements of the Faroes Parliamentary Act on Compensation for Industrial Injuries for the consequences of work accidents and to contribute to The Faroese National Board of Industrial Injuries to cover the risk of occupational diseases.

The master of this vessel is obliged to enter in the log book full information on the occurrence of any work accident or occupational disease and to report work related accidents in the manner prescribed by the Faroes Parliamentary Act on Compensation for Industrial Injuries.

Where an accident at work occurs on a vessel under Faroes flag and the employer has not taken out insurance, insurance companys accounting insurance in the Faroe Islands shall pay expenses in accordance with Section 21, subsection, 1 in the Faroes Parliamentary Act on Compensation for Industrial Injuries.

The benefits under the Act comprise:
1) Compensation for loss of earning capacity.
2) Compensation for permanent injury.
3) Expenses to medicine, health care treatment etc. which is not covered by the Faroes national health insurance.
4) Transitional allowance to dependents at death.
5) Compensation for loss of provider.

For more information about the Faroes Industrial Injuries compensation system, please contact The Faroese National Board of Industrial Injuries (Føroya Vanlukkutryggingarráð):

The Faroese National Board of Industrial Injuries (Føroya Vanlukkutryggingarráð)
c/o Sorinskrivarin
C. Pløyensgøta 1
100 Tórshavn

E-Mail: fvr@sorinskrivarin.fo
Phone: +298 31 10 03